












*Við nýggja Carens eru Kia komnir á marknaðir við einum MPV, sum av álvara tekur upp kappingina við 7-persónabilarnar á marknaðinum*

# Kia Carens til sjey persónar

**Kia eru nú komnir á marknaðin við nýggjum Carens, sum av álvara tekur upp kappingina við 7-persónabilarnar á marknaðinum**

**BILAR**
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Nógvar nýggjheitir eru á veg frá Kia í hesum døgum. Ein av hesum er Kia Carens, sum er ein heilt nýggjur bilur, ið avloysir forgangaran við sama navnið. Eins og við øðrum koreanskum bilum kann hesin als ikki samanberast við forgangaran. Carens er bygdur yvir sama plattform sum Kia Magentis.

Í mun til forgangaran, ið var ein 5-persónabilur, er aksilfrástøðan vaksin við 14 cm, hetta fyri at geva tvey sitipláss afturat aftast í bilinum.

Kia Carens er ein lutfalsliga stórur 7 persónabilur við sera liðiligari innrætting, t.d. eru aftastu setrini gjørd soleiðis, at tey kunnu leggjast niður uttan nakað hóvasták. Hetta fyri at tað skal vera so lætt og liðiligt sum gjørligt at broyta í kabinuni, alt eftir hvussu nógv fólk og viðføri er í bilinum. Aftastu setrini eru eisini lætt atkomulig. Bilurin er væl egnaður til familjur við fleiri børnum.

Koyrieginleikarnir eru sum á einum evropeiskum bili við t.d. »multilink« bakhjólsupphangi og fastari fjaðraskipan, sum ber vektina væl. Carens hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. ABS við EBD, airbag framman, í síðunum og gardinairbag, aktivar nakkastúttur og ESP við TCS.

Alt fleiri japanskir og koreanskir bilar verða teknaðir í Evropa, og okkara heimspartur er av so stórum týdningi fyri bilverksmiðjurnar, at alt verður gjørt fyri at bilarnir skulu tekkjast evropearum. Carens er designaður á evropeisku miðstøðini hjá Kia í Rüsselsheim í Týsklandi. Teir hava sett sær sum mál at selja 160.000 Carens um árið í Evropa. Bilurin skal kappast upp á bæði kvalitet og prís.

Carens fæst við 2,0 litur bensin- og dieselmotorum við ávikavist 145 og 140 hk. Bensinútgávan kostar kr. 239.800, meðan dieselútgávan kostar kr. 299.800.



*Kia Carens er ein 7 persónabilur við sera liðiligari innrætting*

**Kia Carens 2.0 LX** (bensin)

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 2,0 litur 16V bensin 145 hk |
| **0-100 km/t** | 11 sek. |
| **Bensinnýtsla** | 12,3 km/l (blandað koyring) |
| **Dekkstødd** | 205/65-15 |
| **Stødd og vekt** | |
| **Longd** | 454,5 cm |
| **Breidd** | 182,0 cm |
| **Hædd** | 172,0 cm |
| **Eginvekt** | 1.500 kg |
| **Viðførisrúm** | 430 litrar |
| **Prísur** | frá **kr. 239.800,-** |



**BERG MOTORS** Staravegur 1-3 · FO-100 Tórshavn · Tel. 313535 · www.bergmotors.fo